

# Gullið fer kring alt landið

## Einasta róðrarfelagið, sum hevur møguleika at vinna fleiri kappingar, er Argja Róðrarfelag

Tróndur Arge

Undan sjeynda og síðsta kappróðrinum í ár er tað longu greitt, at vertirnir fyri kappróðrinum á Ólavsøku, Havnar Róðrarfelag, bara hava møguleika at vinna FM gull í kappingini millum dreingir í barnaróðrinum, og at hitt felagið í Havnini, Róðrarfelagið Knørrur, einki FM heiti fer at vinna í ár.

Í summar hava sigrarnir í kappróðrinum verið spjaddir kring alt landið, og leingi sá tað út til, at einki felag fór at vinna meiri enn eitt FM í kappingunum, tá ið sæð verður burtur frá barnaróðrunum.

Seinastu vikurnar hava tey á Argjum gjørt eitt orduligt sprell, og um væl veit við hjá argjafólki á Ólavsøku, so er møguleiki fyri, at Argja Róðrarfelag strýkur avstað við trimum meistaraheitum: Teistin við gentumanning í barnaróðrinum, Blikur í kappingini millum dreingir og so Argjabáturin, sum tær seinatsu ferðirnar hevur gjørt so mikið nógv um seg, at hann nú hevur møguleika at vinna á Ólavsøku og harvið at vinna FM.

Tað er greitt, at klaksvíkingar og fuglfirðingar hava vunnið hvørt sítt FM heiti. Tað skal vilja heilt illa við, um Kapp-róðrarfelagið NSÍ ikki skal vinna FM í kappingini millum 10-mannafør, og hóast tað ikki hevur hilnast so væl tvær tær seinastu ferðirnar, so liggur Sølmundur framvegis á odda í kappingini millum 6-mannafør við kvinnum.

Møguleiki er fyri, at tvey gullsett enda í Sundalagnum – Falkur og Hvessingur – og møguleiki er fyri, at Beinta úr Miðvági, Vestmenningur, Kvívíkingur og Royndin Fríða úr Vági kunnu vinna gull.

## Støðan eftir seks FM kappingar

*Teir bátarnir, sum framvegis hava møguleika at vinna heiðursmerkir, eru tiknir við í yvirlitinum*

**Barnaróður dreingir**

| | | |
|---|---|---|
| Títlingur | 40 stig | |
| Havfrúgvin | 36 stig | |
| Drekin | 32 stig | |

**Barnaróður gentur**

| | | |
|---|---|---|
| Teistin | 39 stig | (FM) |
| Drekin | 30 stig | |
| Spógvin | 29 stig | |
| Fípan Fagra | 24 stig | |

**5 mannafør dreingir**

| | | |
|---|---|---|
| Blikur | 39 stig | |
| Royndin Fríða | 39 stig | |
| Firvaldur | 24 stig | |
| Svanur | 18 stig | |
| Teistin | 18 stig | |
| Jallurin | 18 stig | |

**6 mannafør kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| Sølmundur | 40 stig | |
| Hvessingur | 38 stig | |
| Gongurólvur | 27 stig | |
| Riddarin | 27 stig | |

**5 mannafør gentur**

| | | |
|---|---|---|
| Beinta | 38 stig | |
| Falkur | 36 stig | |
| Silið | 28 stig | |
| Ørnin | 22 stig | |
| Tjaldrið | 21 stig | |

**5 mannafør kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| Erla Kongsdóttir | 41 stig | (FM) |
| Drekin | 34 stig | |
| Firvaldur | 32 stig | |

**6 mannafør menn**

| | | |
|---|---|---|
| Páll Fangi | 42 stig | (FM) |
| Tvørabáturin | 34 stig | |
| Riddarin | 29 stig | |
| Smyril | 26 stig | |

**8 mannafør**

| | | |
|---|---|---|
| Kvívíkingur | 38 stig | |
| Argjabáturin | 37 stig | |
| Fríggjarin | 31 stig | |
| Árnfirðingur | 26 stig | |

**10 mannafør**

| | | |
|---|---|---|
| Eysturoyingur | 40 stig | |
| Vestmenningur | 38 stig | |
| Hoyvíkingur | 30 stig | |